

www.oljan.fo

**Jan Müller** 19 - 01 - 2012

# Loyvi 005 latið aftur og frítt hjá øðrum at søkja um

Jarðfeingi upplýsir á heimasíðu síni, at loyvð 005 á landgrunninum er latið aftur av fyristøðufelagnum ENI og er tí frítt hjá øðrum at søkja um. Í 2010 varð brunnurin 6004/8a-1 boraður. Tann 1. november 2010 varð almannakunngjørt, at funnin vóru kolvetni í tunnum sandløgum millum tjúkkari gosgrýtisfláir. Sagt varð eisini, at framhaldandi kanningar vóru neyðugar til tess at meta nærri um samlaðu kolvetnisnøgdirnar í loyvisøkinum. Hesar kanningar eru nú gjørdar, og hava loyvishavararnir valt ikki at halda fram við loyvinum, men lótu tað innaftur, tá loyvistíðin gekk út í oktober 2011. Loyvisøkið 005 er nú frítt hjá møguligum øðrum áhugaðum at søkja um. Kolvetnislógin heimilar landsstýrismanninum eftir nærri ásettum reglum at ganga umsókn á møti um leitiloyvi, uttan at útbjóðingarumfar fyrst er hildið. Dátur frá boringini eru í trúnaði 2 ár eftir, at boringin var liðug, t.e. til oktober 2012. Eftir tað kann Jarðfeingi selja øðrum áhugaðum tær. ENI Denmark B.V. var fyristøðufelag í loyvinum. Hinir loyvishavararnir vóru Cieco E&P, Dana Petroleum, First Oil Expro, Føroya Kolvetni og OMV skrivar Jarðfeingi á heimasiðu síni. Mynd - Tað var boripallurin West Phoenix, sum boraði Anne Marie brunnin á loyvisøki 005.